**Inniróður 2018/19**

Tíðin er komin til at melda til kappingarnar í inniróðri í heyst. Sum áður fráboðað, verða fýra kappingar í inniróðri í heyst:

- 22. september í Vági
- 20. oktober í Sandavági
- 17. november á Glyvrum
- 8. desember á Argjum

Tilmeldingargjaldið er 100 kr. fyri heystkappingina og FM. Tilmeldingarfreistin er mikuvkvøldið 19. september 2018 kl. 24.00.

Tilmeldingin skal sendast til innirodur@rsf.fo.

Tit skulu upplýsa navn, bústað, føðingardag og hvat felag, tit eru limir í. Eisini skulu tit skriva, um tit rógva tung- ella lættvekt.

RSF hevur avgjørt, at tey ungu frá 12 til og við 17 ár fara til DM, og tey vaksnu frá 18 ár fara til HM. Meira kunning um DM og HM fæst seinni.

Fyri at luttaka í kappingum uttanlands umboðandi RSF, skal viðkomandi verða aktivur limur í einum føroyskum kappróðrarfelag. Umframt at kravtíðin skal setast til eina av kappingunum í Føroyum.

Vektflokkarnar verða +2,5 kg, tvs. fyri kvinnur er markið 61,5 + 2,5 kg, og menn 75 + 2,5 kg.

Børnini koma at kappast í bólkum svarandi til 1 árgang eldri, enn tey eru nú. Hetta kemst av, at tey skifta bólk eftir 1. januar. Hetta ger, at tey eru klár til avbjóðingina eftir 1. januar í DK

Møguleiki verður hjá rógvarum, sum ikki eru úttiknir í landsliðshópin at koma við í ferðalagið til DM og HM. Hesir rógvarar skulu tó sjálvir gjalda fyri ferð og uppihald. RSF er sinnað at gjalda fyri tilmeldingina.

Eisini kann RSF taka sær av at bíleggja ferðaseðlar og hotel, so ein kann verða við í bólkaavslátrinum. Um so er, at tað eru rógvarar, ið eru áhugaðir í hesum, skulu hesir venda sær skrivliga til rsf@rsf.fo

Møguleiki er at luttaka í hesum bólkum:

<u>Einstaklingakappingar børn</u>

– Gentur – 12 ár (2 min)
– Dreingir – 12 ár (2 min)
– Gentur – 13 ár (3 min)
– Dreingir – 13 ár (3 min)
– Gentur – 14 ár (4 min)
– Dreingir – 14 ár (4 min)
– 2000m Gentur – 15 ár
– 2000m Dreingir – 15 ár
– 2000 m Gentur – 16 ár
– 2000m Dreingir – 16 ár
– 2000m Gentur – 17 ár
– 2000m Dreingir – 17 ár

<u>Einstaklingakappingar vaksin</u>

– 2000m Kvinnur Opin bólkur lættvekt
– 2000m Kvinnur Opin bólkur tungvekt
– 2000m Menn Opin bólkur lættvekt
– 2000m Menn Opin bólkur tungvekt
– 2000m Kvinnur 30-39 ár lættvekt
– 2000m Kvinnur 30-39 ár tungvekt
– 2000m Menn 30-39 ár lættvekt
– 2000m Menn 30-39 ár tungvekt
– 2000m Kvinnur 40-49 ár lættvekt
– 2000m Kvinnur 40-49 ár tungvekt
– 2000m Menn 40-49 ár tungvekt
– 2000m Kvinnur 50+ ár
– 2000m Menn 50+ ár

Róðrarsamband Føroya